ØLKRÍGGJ

# ØLKRÍGGJ MILLUM ÍSLA

**Íslendskt bryggjarí krevur Føroya Bjór Gull av hillunum í Íslandi, at Føroya Bjór steðgar við marknaðarføring í Íslandi, og at Føroya Bjór Gull ikki verður innflutt til Íslands**

Eirikur Lindenskov



*Annika og Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, undrast á stigið hjá íslendska bryggjarnum at royna at steðga Føroya Bjór í Íslandi vegna navnið á gullølinum*

Íslendska bryggjaríið, Ölgerðin, hevur sent føroyska bryggjarínum Føroya Bjór krígsavbjóðing. Í brævi, sum sakførari hjá Ölgerðini hevur sent Føroya Bjór, íslendska umboðnum hjá Føroya Bjór í Íslandi og stjóranum í íslendsku rúsdrekkasøluni, krevur Ölgerðin, at Føroya Bjór gevst við at selja Føroya Bjór Gull í Íslandi, og at alt ølið verður tikið av hillunum í íslendsku rúsdrekkasøluni.

– Ölgerðin krevur, at Føroya Bjór steðgar hesum ólógliga virksemi og steðgar við at brúka vørumerkið »Gull« í Íslandi. Vit krevja eisini, at Føroya Bjór steðgar innflutninginum, marknaðarføring og sølu av Føroya Bjór Gull í Íslandi, og steðgar øllum ólógligum virksemi, ið ger seg inn á varda vørimerkið hjá Ölgerðini.

Soleiðis stendur í brævinum, sum Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór fekk fríggjadagin 15. august, hóast brævið varð dagfest fríggjadagin 8. august.

Í brævinum sigur advokaturin hjá Ölgerðini, at hon væntar sær svar innan tíggju dagar frá dagfesting, tað vil siga í dag.

– Um vit ikki hava fingið svar, so hevur klientur mín einki annað val enn at fara í rættin við málinum fyri at verja sín rætt, sigur Hjordis Birna Hjartardóttir, sakførari hjá Ölgerðin.

Í brævinum til Føroya Bjór skrivar advokaturin víðari, at Ölgerðin er førandi bryggjaríið í Íslandi innan soda- og alkoholframleiðslu, og at Ölgerðin eigur nógv av teimum elstu og best kendu vørumerkjunum á marknaðinum. Felagið hevur síðani 1. mars í 1989 framleitt og selt vælumtókta Egils Gull.

1. mars í 2011 hevur Ölgerðin skrásett »Gull« og »Egils Gull« hjá íslendska patentkantórinum.

Felagið heldur seg tí hava einkarrætt at nýta navnið »Gull« í Íslandi, og sakførarin staðfestir í brævinum, at eingin annar enn Ölgerðin kann marknaðarføra seg undir navninum »gull« og nøvnum, sum líkast tí so nógv, at fólk kunnu mistaka seg.

– Føroya Bjór ehf. innflytur og selur øl úr Føroyum í heilsølu í Íslandi, eisini »Føroya Bjór Gull« í 330 ml dósum. Høvuðsfokus á dósunum eru stavirnir »GULL«, skrivað við stavum við stórum. Dósirnar við føroyska og íslendska ølinum líkjast nógv, litir og heildin eru sera lík.

– Havandi hetta í huga, er stórur vandi fyri, at fólk kunnu taka feil av hesum

---

# Ölgerðin: Ynskja ikki kríggj við Føroya Bjór

**– Vit vilja bara seta okkum niður og tosa við Føroya Bjór, so vit kunnu greiða hetta í sátt og semju. Vit ynskja einki stríð við Føroya Bjór.**

Eirikur Lindenskov

Soleiðis sigur Andri Thor Guðmundsson, stjóri í íslendska bryggjarínum, Ölgerðin, við íslendska netmiðilin, dv.is.

Tað er eftir at in.fo skrivaði um kravið frá íslendska bryggjarínum um at steðga Føroya Bjór Gull í Íslandi, at hetta gjørdist søga í íslendskum miðlum.

Við tilvísing til in.fo hevur íslendska DV spurt stjóran á Ölgerðini um hetta málið. Andri Thor Guðmundsson váttar, at teir hava sett seg í samband við Føroya Bjór um málið.

– Advokatur okkara hevur mælt okkum til at gera vart við trupulleikan hjá Føroya Bjór og royna at finna semju um nýtsluna av navninum, tí hetta er eitt skrásett vørumerki hjá okkum í Íslandi, og um vit ikki gera vart við tað, so økir tað vandan fyri, at onkur annar eisini fer at nýta navnið, sigur Andri Thor Guðmundsson, stjóri í Ölgerðin við DV.

– Men tað er als ikki ætlanin at hótta við stevning ella øðrum fíggindaligum stigum. Vit vilja bara seta okkum niður og tosa um málið fyri at finna eina loysn við samráðingarborðið, sigur Andri Thor Guðmundsson.

Hóast stjórin í íslendska bryggjarínum roynir at lítisgera stigið, hann hevur tikið yvir fyri føroyska bryggjarínum, so er talan um beinleiðis hóttan um rættarsókn, sum Føroya Bjór ikki gevst við at selja gullølið í Íslandi í dag.

– Um vit ikki frætta fá tykkum í seinasta lagi mánadagin 18. august, hevur klientur mín einki annað vl enn at fara í íslendska rættin fyri at verja síni rættindini, sigur sakførarin, sum ikki við einum einasta orðið tosar um at partarnir skulu seta seg við samráðingarborðið til tess í sátt og semju at finna eina loysn

Kravið er einfalt at steðga Føroya Bjór í at selja gulløl í Íslandi.

Tað sær Einar Waag á Føroya Bjór sum eina krígsavbjóðing.

